# Gjøgnumtrekkur á Mølini

**EB/STREYMUR**
FO-470 Eiði
Tlf. 423185 / 423255
www.eb-streymur.fo

**STOVNAÐ:**
23.01.1993

**FORMAÐUR:**
Olaf Fríðheim

**MEISTARAR:**
Ongantíð.
Besta úrslit, nr. 8 í 1. deild í 2001

**STEYPAVINNARAR:**
Ongantíð

**GREIPUVINNARAR:**
Ongantíð

**Í 1. DEILD (5 ÁR):**
1994 og 2001-

**Í EUROPA:**
Ongantíð

**Eftir at fleiri lyklaspælarar frá liðnum í fjør eru farnir aðra staðni at royna seg, fara teir í EB/Streymi fyrst og fremst av stríðast við spælarum, sum eru uppaldir í felagnum**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*



*Ungu spælararnir, sum eru uppaldir í felagnum, verða hesa ferð mettir at skula gerast álitismenn hjá EB/Streymi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er trongligt á fótbóltskortinum í miðstaðarøkinum. Hetta hevur við sær, at kappingin um spælararnar er stór. At hetta er ein veruleiki, hava teir í EB/Streymi í ríkt mát kent sviðan av, síðani lok varð lagt á kappingarárið í fjør.

Í fjør rukku teir besta úrslitinum nakrantíð. Síðani tá hava teir mist fleiri at lyklaspælarunum. Egil á Bø og Ronnie Samuelsen, sum var liðformaður í fjør, eru farnir til B36, og Magni á Lakjuni er farin til Fuglafirðar. Marek Vierzbicki er farin aftur til Klaksvíkar. Hesir fýra eru millum teir átta, ið vóru oftast á liðnum í fjør.

Hóast EB/Streymur í fjør rakk sætta plássinum við 24 stigum – sama stigatal sum KÍ á fimta plássinum – so høvdu teir ikki so ógvuliga breiðan hóp. Tí sigur tað seg sjálvt, at tað kennist sum dyggur smeitur, at fýra av stuðulsspælarunum eru burtur, og at onkrir, sum vóru við í fjør, eru farnir til skips.

Tað er neyðugt so at siga at fara undir at byggja nýtt lið upp, og teir í EB/Streymi verða heilt væl nøgdir, um tað fer at eydnast at endurvinna endastøðuna frá í fjør. Fyrst og fremst verður talan um stríð at varðveita plássið í bestu deildini, sum EB/Streymur hevur átt trý tey seinastu árini.

Piotr Krakowski er annað árið á rað venjari á Eiði. Tað er vorðið eitt av aðaleyðkennunum hjá pólverjanum, at hann er ábyrgdarmaður hjá liðum, sum ikki hava bestu manningarligu fyritreytirnar at standa seg. Og tað hevur ofta eydnast væl hjá Piotr at fáa væl burturúr, hóast tað í fyrstu syftu ikki sá so bjart út.

Hjálpin aðra staðni frá er kærkomin á Mølini. Gunnar á Steig ferðast framvegis úr Klaksvík og um Leirvíksfjørð at venja og spæla, og Sorin Anghel úr Rumenia er sera væl lýddur og dugnaligur álopsspælari. Andrzej Pacek, sum í fjør var nógv burturi frá orsaka av skurðviðgerð, er aftur í ár komin úr Póllandi og til Eiðis at hjálpa til. Og so hevur tað eydnast at fáa onkrar at ferðast úr Havnini og norður eftir fyri at hjálpa til. Talan er um Fróða Clementsen, sum í meiri enn helminginum av dystunum í fjør var í B36 miðverjuni, og Carl Herup Høgnesen, sum fyri nøkrum árum síðani var síðuspælari á besta B36 liðnum, og sum nú tykist vera troyttur av bara at spæla á næstbesta B36 liðnum. Hóast hesir báðir síðst nevndu ikki hava verið roknaðir at fáa serligar møguleikar í høvuðsstaðnum, so er eingin ivi um, at teir verða kærkomnir styrkir hjá EB/Streymi.

Men ungu spælararnir, sum eru uppaldir í felagnum, verða hesa ferð mettir at skula gerast álitismenn. Síðani teir hava verið blaðungir hava Hans Pauli Samuelsen, Marni Djurhuus og Bárður Olsen spælt á besta liðnum. Í fjør stríddi Gert Hansen stríddi seg til fast pláss í miðverjuni, og í ár er hann vongverji. Brian Olsen hevur verið nógv við higartil í ár. Teitur Joensen og Esmar Eiðisgarð hava ikki enn verið til venjingar. Hin fyrri hevur inntil hondbóltsárið var liðugt lagt alt í spælið innandura.

Síðani EB/Streymur kom í bestu deildina, hava allir heimadystirnir verið spældir á Mølini. Tað er ein fótbóltsvøllur í Streymnesi, men hann hevur ikki verið nýttur nakað serligt, síðani graslíkið varð lagt á vøllin á Mølini. Hetta seinasta árið hevur verið tosað nógv um, at graslíkið skal leggjast á vøllin í Streymnesi. Enn er ikki greitt, um heimavøllurin hjá EB/Streymi skal skifta millum Eiði og Streymnes, tá ið graslíki verður lagt á vøllin í Streymnesi.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Gunnar á Steig | 18/-36 | (0–0) | KÍ |
| Sámal Johan Samuelsen | | | |
| **Verja** | | | |
| Gert Hansen | 13/2 (0–0) | | |
| Andrzej Pacek | 10/0 (1–0) | | KÍ, B36 |
| Ólavur Poulsen | 3/0 (0–0) | | |
| Jóhan á Stongum | | | |
| Høgni Hansen | 1/0 (0-0) | | |
| Hallur Hansen | | | |
| Sigfríður Abrahamsen | | | |
| Knút Vesturún | | | HB |
| Fróði Clementsen | | | B36 |
| **Miðvøllur** | | | |
| Bárður Olsen | 17/0 (0–1) | | |
| Marni Djurhuus | 16/2 (3–0) | | |
| Hans Pauli Samuelsen | 18/5 (3–0) | | |
| Jákup Martin Joensen | 16/0 (1–0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| Brian Olsen | | | |
| Carl H. Høgnesen | | | B36 |
| **Álop** | | | |
| Sorin Anghel | 17/9 (1–0) | | |
| Sonni L. Petersen | | | NSÍ |
| **Tilgongd** | | | |
| Sonni L. Petersen | 17/6 (1–0) | | NSÍ |
| Fróði Clementsen | 13/0 (1–0) | | B36 |
| Carl H. Høgnesen | | | B36 |
| Brian Olsen | | | Fluttur upp |
| **Frágongd** | | | |
| Marek Vierzbicki | 18/2 (0-0) | | KÍ |
| Magni á Lakjuni | 17/2 (0-1) | | ÍF |
| Ronnie Samuelsen | 17/4 (2-0) | | B36 |
| Egil á Bø | 16/4 (2-0) | | B36 |
| **Venjari** | | | |
| Piotr Krakowski (PÓL) | | | |



# Ábyrgdin løgd á nýggjar herðar

**Í EB/Streymi halda tey seg hava riðið skelkin av sær, sum tað var, tá ið tað frættist, at fleiri at stuðulsspælarunum í fjør fóru í onnur feløg**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*



*Framrættaði miðvallarin, Hans Pauli Samuelsen, dámar væl, at hann hevur fingið júst henda leiklutin í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ein stórur skelkur, tá ið tað frættist, at tveir av stuðulsspælarunum í fjør vóru fluttir í B36, og tað kendist sum um støðan gjørdist uppaftur torførari, tá ið ein annar av frontfigurunum fór til Fuglafirðar. Í EB/Streymi fóru tey eitt sindur ivandi og trilvandi undir fyrireikingarnar til nýggja fótbóltsárið. Men tey knarra ikki, og nú tað stundar til landskappingina siga tey seg ikki síggja so svart upp á tingini. At saknurin ikki varð so stórur komst eisini av, at Sonni L. Petersen er komin úr NSÍ og Fróði Clementsen og Carl H. Høgnesen úr B36.

– Tað hevur gingið væl hjá okkum í venjingardystunum. Spælið hevur verið á góðari leið, og úrslitini hava verið góð. At vit taptu tepurt í Gundadali ímóti HB í fyrstu royndini í kappingini um løgmanssteypið, var heldur ikki so galið.

Vit tosa við Hans Paula Samuelsen, sum er 19 ára gamalur miðvallari. Saman við honum eru tríggir javnaldrar á liðnum, og onkur er uppaftur yngri. Higartil hava Marni Djurhuus, sum nú er sentralur verjukendur miðvallari, meðan Hans Pauli er meiri framrættaður, og verjuspælarin Gert Hansen og miðvallarin Bárður Olsen verið ungir og mettir millum teir mest óroyndu. Í fjør vóru tað eitt nú Egil á Bø, Ronnie Samuelsen og Magni á Lakjuni, sum stóðu frarmmanfyri teir. Nú eru hesir burtur, og so eru ungu menninir fluttir eitt stig longri fram á liðnum. Í hvussu so er tá ið tað hevur við ábyrgdina at gera.

– Vit fýra hava spælt saman síðani vit vóru heilt smáir. Vit vunnu FM í smápiltadeildini við Streymi í 1993, og vit hava hildið saman alt síðani. Summir okkara hava verið fleiri ár á besta liðnum og onkur kom afturat í fjør. Tá ið tú ert nýggjur spælari, so hugsar tú ikki so nógv um ábyrgd. Men tá ið teir, sum vóru royndir spælarar, tá ið tú komst á liðið, fella frá ella fara aðra staðni, so er tað ein nátúrlig gongd, at man kennir størri ábyrgd.

Pacek, Sorin Anghel og Jákup Martin Joensen, sum er nýggjur liðformaður, eru royndastu menninir á liðnum, og Hans Pauli Samuelsen heldur, at blandingin millum ungar og eldri og spælarar, sum eru komnir aðra staðni frá og teir, sum eru uppvaksnir í Sundalagnum og á Eiði, er góð.

– Piotr er venjari, og okkum dámar hann sera væl. Tað ræður um at fáa góðan felagsskap á liðnum og gott lag, og tað hevur venjarin eyga fyri. Vit hava vant fimm ferðir um vikuna, men nú dystir eru á skránni hvørja viku, venja vit fýra ferðir. Venjarin hevur altíð bóltin við í venjingunum, so tað hevur verið hugaligt, sigur framrættaði miðvallarin. Honum dámar væl, at hann hevur fingið júst henda leiklutin í ár.

– Vit hava broytt spælskipanina eitt sindur, um sammett verður við í fjør. Tá høvdu vit stóra breidd á miðvøllinum, og mín lutur var tann ytsti á miðvøllinum í vinstru ella í álopinum. Nú eru Marni Djurhuus og eg mitt á miðjuni. Eg eri frammanfyri og hann aftanfyri, og so eru Bárður Olsen og Jákup Martin Joensen hvørju megin við, uttan at teir eru heilt í borðunum. Piotr vil hava, at aftastu spælararnir flyta skjótt fram á vøllin, og tað hava vit avgjørt einki ímóti. Í útgangsstøðuni eru vit meiri framrættaðir, enn vit vóru í fjør.

## Javnari kapping

Á Mølini vóru teir væl nøgdir við sætta plássið í fjør. Hóast stóra leikliga framgongd seinnu árini, so hava teir ikki gloymt, hvussu skjótt tað kann vera at gerast partur av niðurflytingar stríðnum. Men teir halda samstundis, at um tað lagar seg hampuliga væl, so kunnu teir lyfta sær eitt sindur hægri, enn teir vóru í fjør:

– Sammett við onkur onnur feløg eru vit ikki so væl mannaðir, og tað kann hava við sær, at tað fer at kennast meint, um onkrir stuðulsspælarar verða raktir av skaðum og leikbannum. Vit rokna við, at talan verður um javna kapping. Hetta skal skiljast soleiðis, at vit rokna okkum at fara at verða í bólki saman við fleiri øðrum feløgum, og tá kunnu tað verða smálutir, sum fara at gera av, hvør fer at enda á fjórða ella fimta plássinum og hvør fer at stríðast fyri at sleppa undan niðurflytingini, heldur Hans Pauli Samuelsen.

Fleiri feløg hava mist fleiri spælarar síðani í fjør. EB/Streymur telist millum hesi feløgini. Men teir rokna við, at onnur feløg hava mist, uttan at hava fingið so nógv afturfyri missin, sum teir í EB/S hava gjørt. Tí halda teir seg ikki í útgangsstøðuni at vera so illa fyri.

Nú fæst at síggja, hvussu tað fer at roynast hjá ungu monnunum, sum nú hava fingið størri ábyrgd í EB/Streymi. Tá ið teir í 1993 vóru við til at vinna smápiltadeildina, og tá ið teir sum smádreingir luttóku í innandura kappingum, varð ofta tikið til, hvussu ágrýtnir teir vóru, hvussu væl teir dugdu at fara við bóltinum, og hvussu gott fótbóltsskilið hjá teimum var. Nú eru teir ábyrgdarmenn í fremstu røð.

Hans Pauli Samuelsen er farin undir triðja árið í bestu deildini. Bæði í fjør og í fyrraárið var hann við í øllum átjan landskappingardystunum. Bæði í fjør og í fyrraárið var hann sekstan av átjan ferðum millum teir fyrstu ellivu. Í fyrraárið skoraði hann eitt mál, og í fjør gjørdi hann fimm mál. Tað var bara Sorin Anghel, sum fekk fleiri mál enn Hans Pauli í fjør. Sorin fekk níggju mál. Aftur í ár verður Sorin Anghel roknaður sum besta álopsvápnið hjá EB/Streymi. Í álopinum saman við honum er Sonni L. Petersen. Hans Pauli er framrættaður miðvallari. Leikluturin hjá manninum í hesi ódnini er at leggja bóltin fyri føturnar á álopsmonnunum og eisini sjálvur at vera málsøkin.

### Metingin

EB/Streymur hevur mist fleiri av sínum stuðulsspælarum frá í fjør, men ungir menn eru klárir at taka við ábyrgdini, og roknast kann við at EB/Streymur odar seg upp ímóti miðuni